

*Tað var kærleiki við fyrsta eygnabrá, tá Joanna Delia og Henry Margeir Petersen hittust til veitslu í Valletta fyri einum ári síðani*
*Mynd: privat*

loysingina frá Bretlandi kravdi so høga leigu frá bretsku herflotastøðini á oynni, at bretar valdu at rýma. Jú, Malta hevur roynt at ganga egnar leiðir, men um aldarskiftið vildi samfelagið ganga í takt við tey stóru inni í Evropeiska Samveldinum, og í 2004 fekk tjóðin ES-limaskap.

Malta hevði eina serstøðu hjá teimum sameindu undir seinna heimsbardaga. Av fortovskaféini í Republic Street eru bara fáir metrar yvir til loyniligu, strategisku, høvuðsstøðina hjá teimum sameindu í Miðjarðarhavinum undir seinna heimsbardaga, sum fyri stuttum varð latin upp fyri almenninginum. Støðan hjá Malta mitt í Miðjarðarhavinum og stóra, bretska herstøðin í Valletta gjørdu høvuðsstaðin til eitt bumbumál hjá týsku og italsku hermegini. Hóast bumburnar regnaðu yvir býin fyrstu krígsárini, sæst aldargamla søgan hjá Valletta framvegis allastaðni í býarmyndini.

Líka til sjeytiárini var maltesiski høvuðsstaðurin ein býur, týðuliga merktur av vertshús- og skøkjulevnaði, sum kom í kjalarvørrinum av bretsku hermonnunum á oynni og sjómonnum. Men í sjeytiárunum flutti ein rættuliga stórur partur av fólkinum úr býnum, og framvegis eru nógv tóm hús í Valletta. Hetta gevur møguleikar fyri tilflytarar og onnur, sum vilja royna eydnuna í Valletta, og tað í eini tíð, har myndugleikarnir gera stórar íløgur í at fríðka býin.

Joanna Delia og Henry Margeir Petersen hava tikið kjansin og sett føtur undir egið borð í hjartanum av elsta býarpartinum í Valletta.

- Ja, her er eitt sindur at taka hondina í, siga tey skemtandi, tá vit stíga innar í 400 ára gomlu húsini hjá teimum.

Húsini eru høg og smøl, fastbygt er til báðar síður, og stinga tey seg fimm hæddir upp í loft. Jú, nógv er at gera við húsini, onkustaðni má farast við stiga millum hæddirnar, meðan tey íðin greiða frá sínum ætlanum. Viður og timbur verður at kalla ikki brúkt á hesum breiddarstigum, so múrsteinar, grót og sement verður álitið í teirra byggiætlan. Komin upp á terassuna á fimtu hædd taka vit eitt tørn afturat, heilt upp á takið.

Sólin stendur høgt á himli yvir Valletta henda seinnapart í september, hitin er um 30 stig, og spegilsklári sjógvurin í stórsligna havnalagnum verður bara brotin av skipunum, ið stevna út og inn. Havnin í Valletta er eitt natúrligt mál hjá flestu cruiseskipum í Miðjarðarhavinum, og hvønn dag vitja fleiri av hesum havsins risum býin. Av takinum síggja vit eisini yvir á niðurløgdu, bretsku herflotastøðina, sum í dag verður nýtt til filmsframleiðslu.

- Hetta er eitt stórt projekt fyri okkum, og tað fara helst at ganga fleiri ár, áðrenn vit eru komin á mál og hava sett øll húsini í stand. Men tað er spennandi, og vit kunnu ikki siga annað enn at vit búgva væl fyri, sigur Henry áðrenn vit leita okkum niður aftur av takinum.

### Flogbrúgv setir ferð á

Tað er enn eingin standmynd av Michael O'Leary á Malta. Men karismatiski stjórin í lágprísflogfelagnum Ryanair fær smílini fram á teimum flestu, tá

Framhald á næstu síðu...